UTTAN ÚR HEIMI

# Vantandi virðing og misbrúkt pressufrælsi



Gunnar Stålsett



Kofi Annan

**Bløðini, sum hava prentað Muhammeds-tekningarnar, hava víst vantandi virðing fyri øðrum átrúnaði, sigur ST-aðalskrivarin, og evropeiska trúarráðið heldur, at bløðini hava misbrúkt pressufrælsið**

PRESSUFRÆLSI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Sjálvandi virði eg pressufrælsið, men tað gevur ikki ein heimild til at særa onnur. Tey, sum nýta pressufrælsið, skulu vísa ábyrgd og duga at døma, hvat er rætt, og hvat er skeivt, sigur ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, í sambandi við stríðið um tekningarnar hjá danska Jyllandspostinum.

Sjálvur heldur hann, at tekningarnar, sum byrjaðu í Jyllandspostinum, og sum síðani hava staðið í fleiri øðrum bløðum, eru tekin um vantandi virðing fyri fremmandum átrúnaði.

– Tey, sum umsita pressufrælsið, eiga at vera varin og at virða tað, sum er heilagt, og tí eiga bløðini at biðja muslimarnar kring heimin um umbering, sigur Kofi Annan. Hann ger samstundis greitt, at hóast muslimarnir kenna seg særdar, rættvísger tað ikki tað, sum er hent teir seinastu dagarnar.

### Pressufrælsið misbrúkt

Evropeiska trúattáðið heldur, at bløðini, sum hava prentað tekningarnar av Muhammed profeti, hava misbrúkt skrivifrælsið. Teir sjey limirnir í ráðnum siga í einari felags kunngerð, at tað er misbrúk, tá bløð prenta tekningarnar uttan at taka neyðug fyrivarni fyri, hvørjar skaðiligar avleiðingar tað kann fáa einstaklingar og bólkar.

Formaðurin í evropeiska trúarráðnum, fyrrverandi norski biskupurin Gunnar Stålsett, segði á einum tíðindafundi í gjár, at eftir hansara tykki hava bløð ikki prentað myndirnar fyri at menna pressufrælsið, men heldur fyri at øsa onnur.

# Iran-kreppan órógvar oljumarknaðin

**Ósemjan um iransku kjarnorkuna hevur gjørt oljumarknaðin ótryggan**

OLJUPRÍSUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Leygardagin gjørdi altjóða kjarnorkueftirlitið av at biðja trygdarráðið hjá ST taka støðu til kjarnorkuætlaninar hjá Iran, og fáar tímar seinni var oljuprísurin hækkaður ein hálvan dollara fyri tunnuna. Í gjár kom ein hálvur dollari afturat oman á prísin, soleiðis at Brent-oljan úr Norðsjónum kostaði beint niðan fyri 64 dollarar fyri tunnuna.

Enn er ikki greitt, hvat trygdarráðið fer at gera við Iran, men marknaðarserfrøðingar siga, at tað fer at fáa stóra ávirkan á marknaðin, um iranar gera av at skerja sína framleiðslu, ella altjóða tiltøk noyða teir til tess.

Iran er eitt tað týdningarmesta landið í OPEC-felagsskapinum. Landið framleiðir umleið fýra milliónir tunnur av olju um dagin, og av hesum fara 2,5 milliónir tunnur til onnur lond.

– Tað merkir, at Iran er næststørsta oljuútflytaralandið í OPEC. Í løtuni er lítið avlop í altjóða framleiðsluorkuni, og tí verður ov lítið av olju á marknaðinum, verður iranska framleiðslan skerd, sigur norski marknaðarserfrøðingurin Benny Clausen við Aftenposten. Hann væntar, at stríðið um iransku kjarnorkuna fer at órógva oljumarknaðin í langa tíð, og at marknaðurin tí verður ótryggur og sveiggjandi.

## Ráðharri fekk egg í høvdið

Fyri aðru ferð hava umboð fyri felagsskapin Fathers 4 Justice gjørt seg inn á bretska kenslumálaráðharran, Ruth Kelly.

Herfyri royndi ein maður í felagsskapinum at leggja ráðharran í hondjørn. Tað miseydnaðist, og maðurin varð tikin og ákærdur fyri harðskap. Mánadagin var málið fyri í rættinum., og Ruth Kelly var eitt av vitnunum. Tá hon var á veg úr rættinum, leyp ein maður ímóti henni og langaði eitt egg í nakkan á henni. Eggið brotnaði, og hvítin og blomman runnu oman eftir nakkanum, sigur Sky News.

Maðurin, sum tveitti eggið í nakkan á Ruth Kelly, segði seg umboða felagsskapin Real Fathers 4 Justice, ið verður hildin at vera ein víðgongdur vongur av tí upprunaliga felagsskapinum, ið stríðist fyri at útvega fráskildum pápum størri samverurætt til børnini.

Ruth Kelly fekk ikki skaða av tilburðinum. Hon sigur við Sky News, at soleiðis er tað at vera politikari í dag.

## Mærsk sloppiðundan stríði

Danska reiðaríið A.P. Møller – Mærsk hevur ikki havt trupulleikar av stríðnum um Muhammedstekningarnar hjá Jyllandspostinum, sigur talskvinnan, Jette Clausen. Við Politiken sigur hon, at felagið hevur boðað sínum viðskiftafólkum frá, at tað tekur frástøðu frá tekningunum, og tað hevur eftir øllum at døma hjálpt.

Jette Clausen vil ikki siga, hvussu reiðaríið annars hevur borið seg at fyri at sleppa undan stríðnum.

Hini donsku reiðaríini hava heldur ikki havt trupulleikar av tekningunum, sigur formaðurin í reiðarafelagnum, Peter Bjerregaard. Hann leggur tó afturat, at felagið fylgir væl við gongdini.

## Drápsmenn ganga leysir

Tað er sagt, at í Russlandi eru tíðindi um morð líka vanlig sum veðurtíðindini, og hetta er neyvan heilt av leið, tí í fjør vórðu næstan 31.000 russar myrdir, og hagtølini vísa eisini, at hvønn dag eru ímillum 80 og 90 morð. Men hagtølini siga eisini, at russiska løgreglan hevur sera ilt við at avdúka drápsmenninar, og at í meðal verða umleið 15 prosent av morðunum ongantíð uppklárað. Tað vil siga, at umleið 5.000 av teimum, sum framdu morð í fjør, ganga leysir enn.

Vladimir Putin, forseti, krevur nú, at løgreglan tekur sær um reiggj. Í einari røðu seinasta fríggjadag legði hann løgregluna undir at hava falsað frágreiðingar og hagtøl við tí úrsliti, at bara í fjør vóru 140.000 brotsverk, sum ákæruvaldið ongantíð frætti um. Av teimum vóru meiri enn 700 morð. Putin vísti harafturat á, at á hvørjum ári hvørva umleið 70.000 fólk í Russlandi, uttan at løgreglan er før fyri at siga, hvat varð av teimum.

Vladimir Ustinov, ríkisákæri, hevur heldur ikki nógv gott at bera løgregluni, men hann skuldsetir eisini herleiðsluna fyri grovt ósketni. Hann vísir á, at á hvørjum ári verða nógv vápn stolin úr goymslunum hjá herinum, og at kanningar hava avdúkað, at bæði generalar og admiralar hava verið uppi í stuldrinum.

## Byggja nýtt marglætisskip

Norska Aker-skipasmiðjan skal smíða eitt nýtt ferðamannaskip til reiðaríið Royal Caribean Cruises, skrivar Aftenposten.

Skipið, sum skal latast eigarunum í 2009, er mett at kosta 7,2 milliardir norskar krónur og verður sambært blaðnum tað dýrasta av sínum slagi. Tað verður 360 metrar langt, 47 metrar breitt, og tað verða 65 metrar frá vatnganginum upp á mastratoppin. Pláss verður fyri 5.400 ferðafólkum.

Hetta er ikki fyrsta skipið, sum Aker byggir fyri Royal Caribean Cruises. Skipasmiðjan hevur fyrr bygt skipið „Adventutes of the Seas“ til sama reiðarí, og í apríl fer „Freedom of the Seas“ av bakkastokki. Skipið, sum sáttmáli nú er gjørdur um, hevur fyribils fingið navnið ́“Genesis“.